gult36 cyan36 magenta36 svart36

HEILSANIR

Gó›i Jón
Hjartaliga tillukku vi› 9 ára degnum 9. apríl og Jórun vi› 8 ára degnum 24. apríl. Ein heilsan er eisini til Fró›a sum fylti 6 ár 22. mars.
Ynskja mamma, Brian og Freja

Hendan karrieran bleiv stutt, men, men, tillukku allir tit eru blivnir: Revisor – Mejeristekn. – Maskinsmi›jur – Datamekanikari og Skipsførari. Somulei›is tillukku vi› 25 ára fø›ingardøgunum.
Myndaeigarin

Jóannes á Lofti ver›ur sjeyti!
Hóast Niels Malmros gjørdi hann gamlan, so er hann framvegis ein unglingi! Hjartaliga tillukku.
Ynskja vit innanfyri omanfyri vegin og ni›anfyri vegin

Eru vit ikki cool?
Tillukku vi› fø›ingardøgunum í mars og apríl.
Heilsan xxxx

Magnus
Nú var tú ov seinur tín piparsveinur. Tú ei kundi náa, svisku at fáa. Tillukku vi› degnum.
Heilsan dullirnar

»Meinar tú ta›?« »Jepp… hann ver›ur 30 ár nú leygardagin«
Heilsan modellin sum er uppi á

Magnus
Hjartaliga tillukku vi› 30 ára fø›ingardegnum leygardagin. Her ert tú væl kryddra›ur… nú ert tú kryddra›ur vi› pipar.

Hey lekri
Her riggar tú væl… Hev›i tú bara rigga líka væl enn…tvætl.
Heilsan dullirnar á Café Natúr

Hesin fitti sjeikurin ver›ur 30 ár nú leygardagin. Nær kemur daman?
Heilsan ølbyllarnir

Hey tit 3
Hjartaliga tillukku vi› døgunum Teitrun og Olivur 9. mars og Magnus vi› degnum 7. apríl og konfirmatiónsdegnum 8. apríl.
Mamma, babba og Viviann

Gó›a Brynhild
Hjartaliga tillukku vi› 13 ára degnum í morgin.
Klemm frá mammu og Torkil

Hey sjeikens
Nú ver›ur tú 30 leygardagin so tú mást fara í gongd nú.
Heilsan vit

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 6. januar 01.
Lis og Hans Jákup

Heilsanir 30,- kr. Sosialurin

5 fer›ir um vikuna

Gevi› gætur

Bert heilsanir, skriva›ar á henda lepan og goldnar frammanundan vi› 30,- kr. fáa innivist í bla›num. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgrei›sluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mi›degi 2 dagar fyri útkomudag. Vi›merki› annars ni›anfyri, um heilsanin ynskist í bla›i› ávísan dag.
❑ T‡sd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústa› aftanfyri á myndina og at leggja vi› ein frankera›an brævbjálva vi› navni og bústa›i.
Um ney›ugt fyri arbei›sgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í bla›i› annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústa›ur: .....
Bygd/b‡ur: ..... Tlf.: .....

Sendi› lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merki› bjálvan: **»Heilsanir«**

gult37 cyan37 magenta37 svart37

TILTØK

FØ‹INGAR

8. mars fingu Jakobina Jóhannessen og Niels Pauli Magnusson, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og viga›i 4300 gr.

26. mars fingu Ketty Andrea Hentze og Petur Hans Winther, Skopun, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og viga›i 3375 gr.

27. mars fingu Gunnfrí› Hvanná og Mikkjal Andreasen, Vágur. ein son. Hann var 55 cm. langur og viga›i 4000 gr.

29. mars fingu Krista Nielsen, Tórshavn og Hanus Mortensen, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og viga›i 3700 gr.

30. mars fingu Tórunn Jacobsen og Dan Olsen, Hósvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og viga›i 3800 gr.

31. mars fingu Sunnrid Poulsen og Ragnar H. Thomsen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og viga›i 3750 gr.

1. apríl fingu Maria og Christian Rubeksen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og viga›i 4500 gr.

1. apríl fingu Anja Olsen og Rógvi Durhuus, Vestmanna, ein son. Hann var 57 cm. langur og viga›i 4800 gr.

1. apríl fingu Elin Jacobsen og Hjalmar Mortensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og viga›i 2900 gr.

1. apríl fingu Petra og Birgir Lützen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og viga›i 3700 gr.

2. apríl fingu Heidi og Heini Gregersen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og viga›i 3500 gr.

2. apríl fingu Kristfrí› Justesen og Símun Jóhannus Mikkelsen, Fuglafjør›ur, ein son. Hann var 56 cm. langur og viga›i 4500 gr.

2. apríl fingu Guri Tórsdóttir og Hans Michael Hansen, Nólsoy, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og viga›i 4200 gr.

3. apríl fingu Tetjana og Barko Ilic, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og viga›i 3600 gr.

4. apríl fingu Selinda í Hei›unum og Mathias Davidsen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 46 cm. long og viga›i 2310 gr.

4. apríl fingu Hanna og Tróndur vi› Á, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 57 cm. long ov viga›i 4860 gr.

4. apríl fingu Beinta Hjalt og Niclas Akraberg Poulsen, Vágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og viga›i 3700 gr.

Natasha Barbara Olsen fekk 20. mars ein lítlabeiggja sum viga›i 3950 gr. og var 54 cm. langur.

Gudstænastur
Pálmasunnudag
Christianskirkjan: kl. 11, konfirmatión, (Talvan gongur í Christianskirkjuni fyri Gu›s or›s bo›an) Niels Pauli Danielsen
Kunoy: kl. 12 (sjónvarpsgudstænasta), Hans Eiler Hammer
Klaksvíkar sjúkrahús: kl. 10.00,
Nor›oya Røktarheim: kl. 14.30, Elsa Funding
Vesturkirkjan: kl. 11, konfirmatión, Bergur D. Joensen
Fuglafjør›ur: kl. 11, konfirmatión, Uni Næs
Havnar kirkja: kl. 11, konfirmatión, Bjarni Bæk
Nólsoy: kl. 12 altarg., kl. 15 familjugudstænasta, Sverri Steinhólm
Sjógvar kirkja: kl. 10.30, konfirmatión, Jógvan Frí›riksson
Nor›skála: kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa vi› orgulvígslu, Hans J. Joensen, biskupur og Emil Olsen

Frí›rikskirkjan: kl. 11, Kjartan Mørkøre
Bøur: kl. 12, altarg., David Johannesen
Hvalba: kl. 11, konfirmatión, Ólavur Rasmussen
Øravík: kl. 12.15, altarg., Petur M. Rasmussen
Sandur: kl. 11, konfirmatión. Jákup R. Hansen
Kvívík: kl. 12, Marjun Bæk
Hvalvík: kl. 11, konfirmatión, Martin R. Jacobsen
Vestmanna: kl. 11, konfirmatión, Inga P. Dam
Broytt kirkjutíð:
Í Vestmanna ver›ur nú fari› í kirkju kl. 11

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismálti› Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli og kl. 18 familjugudstænasta.
Mánadagin kl. 20.30 savnast ungu hjúnini hjá Mai og Marna, Rygsgøta 8.

Kirkju- og missiónshúsi› á Argjum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og Junior, kl. 18 møti, Bergur D. Joensen.
Mánakvøldi› einki ungdómsmøti.
T‡skvøldi› kl. 20 venur Argjakóri› – n‡ggir limir vælkomnir.
Mikumorgunin kl. 07 bønarløta.
Hóskvøldi› kl. 20 bíbliutími. Heimasía›a okkara: www.koma.fo

»Tí› til Gud«
ver›ur í Pálsstovu sunnukvøldi› kl. 21. Hesafer› talar Símun Absalonsen. Jógvan Sk‡lindal og Dánjal av Rana skipa fyri.

Meinigheitin í Hoyvík
Eingin sunnudagsskúli ver›ur sunnudagin vegna páskafrí, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti. Øll eru vælkomin.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Pálmasunnudag kl. 11 møti, major Tjåland, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti vi› Palla Petersen. Mikudagin kl. 15 bøn. Páskastevnan 2001. Skírishósdag kl. 20 møti. Langa Fríggjadag kl. 11 og kl. 18 møti.
Páskaaftan kl. 20 møti. 1. Páskadag kl. 08 páskafrø›i, kl. 09 hátí›artónar vi› Landssjúkrahúsi›, kl. 11 og kl. 18 møti. 2. páskadag kl. 18 møti, majorarnir Ada Cecilie og Thorbjørn Vang lei›a og tala.

Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsi› í Havn
Leygarkvøldi› kl. 21 opi› hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti vi› Andrass Arge, barnaansing ver›ur.
Mánakvøldi› kl. 20 venur Manskóri›.
Meinigheitslegan ver›ur í Nesvík 20.-22. apríl. Tilmelding fer fram vi› at ringja á tlf. 220797, á tlf. 220989 ella í húsinum innan 16. apríl. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltí› Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti og kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Hvítusunnusamkoman Yviri vi› Strond
Sunnudagin:
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 9.30-14 temadagur evni: Profeta or› v/ luttøku av fólki, sum vóru á stevnu í Noregi, tilm. vi› kunningardiskin hjá Filadelfia ella tlf. 314828, kostna›ur 50,- kr. Kl. 17 landsbøn. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen kl. 18 kvøldmøti v/ Jan Joensen.
Mánakvøldi› kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasí›u okkara: www.filadelfia.fo

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

Filadelfia, Sundalagi ›
Í anna›kvøld kl. 18 sangkvøld v/ Theodor Petersen í Eydnuni á Oyrabakka.
Mikudagin kl. 17.30-19.30 Mi›depilin – títt kvøld, tónleikur, spøl, ítriv og matger›.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldi› kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14: Sunnudagsskúli, kl. 16.30: Alpha skei› (11-15 ár), kl. 18: Møti vi› Tummas Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Ørkin, Saltangará
Evangel. møti ver›ur sunnudagin kl. 17 í Arbei›arafelagshúsinum Hæddini í Saltangará vi› David Bech. Veri› hjartaliga vælkomin.

ANDLÁT

Árni Waag, Kópavágur, 75 ár.

29. mars
Rakul á Rógvu, Vestmanna, 88 ár.
Marin Malena Ford, ætta› úr Fámjin, búsitandi í Havn, 80 ár.
Ólavur Tróndesen, Depil, 59 ár.

30. mars
Johannes Mikal Olsen, Sandur, 83 ár.
Bár›ur Berg, Saltnes, 19 ár.
Árant Joensen, Saltangará, 22 ár.
Edvard Lenni Højgaard, Glyvrar, 18 ár.

01. apríl
John Sivertsen, Gjógv, 77 ár.
Hans Hansen, í Tórshavn, 78 ár.
Monika Ríkhar›sdóttir, í Tórshavn, 75 ár.

03. apríl
Hjørdis Vilhelm í Vági, 78 ár.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Eisini tit hava tá nú sorg, men eg skal síggja tykkum aftur, og tá skal hjarta tykkara gle›ast, og eingin skal taka gle›i tykkara frá tykkum. Jóhs. 16. 22

Finnist ta› veruliga ein gle›i, sum eingin kann taka frá okkum? Tá er løgi› at ikki øll eru áhuga›i í at fáa lut í henni. Tí er ta› naka›, sum er skiftandi her á foldum so er ta› gle›in. Í dag kunnu vit vera hjartans gla›, í morgin tyngd ni›ur av sorg.

Finnist ta› veruliga ein gle›i, sum ikki er umskifting hjá, og sum eingin kann taka frá okkum? – Ja, hon finnist, sigur Jesus. Ta› ræ›ur bara um hvat vit gle›ast um. Gle›ast vit um alt ta›, i› rennir út millum fingrarnar, er ei dáni í, at har er einki at halda fast um. Hin sanna gle›in er ankra í nøkrum óvikandi.

Gu› er ljósanna fa›ir, og hjá honum er ikki umbroyting ella skuggi, sum kemur og fer. Hin upprisni Jesus er í gjár og í dag hin sami og um allar tí›ir, og or› hansara stendur fast um ævir allar. Í bo›skapinum um hin upprisna skulu vit kasta akker, ta er hin sanna gle›in. Mín gle›i skal vera í tykkum, seg›i Jesus vi› lærusveinar sínar skíriskvøld. Gle›i hansara var kn‡tt at vissuni um, at Gu› enda›i ikki alt hetta kvøldi›, men at alt skuldi enda vi› ævigum sigri páskamorgun. Ta› er hendan gle›i, sum eingin kann taka frá okkum.

Mangt er í ver›ini, sum fær okkum at gráta. Lívi› nívir ofta so fast, og byr›arnar eru ofta tungar. Og tess meira vit fylgja vi› hvat hendir íkring okkum og hvussu líti› vit orka at bøta um verandi stø›u, tess betri skila vit, at vit hava orsøk til at vera kedd; men júst hetta kann ver›a veruliga orsøkin til ta sonnu gle›ina, gle›ina í Kristi. Tí hann er risin upp, hann livir og ræ›ur um allar ævir.

Kristus er risin upp.
Ta› er satt!
Gle›iliga hátí›

John S. Myllhamar, trúbo›ari